RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Hví skulu vit brúka endurskin?

# Spurnarblað um endurskin

## 4.-5. flokkur

---

Tú skalt seta ein kross (x) við rætta svarið.

**Spurningur 1:**

### Hvussu gert tú teg sjónliga/n í ferðsluni í dagslýsi?

- ☐ Við at ganga í klæðum í bjørtum litum
- ☐ Tað ger ikki mun, hvørjum eg eri í dagslýsi, tí tá síggist eg
- ☐ Við at vera í minst tveimum endurskinum

**Spurningur 2**

### Hvussu gert tú teg sjónliga/n í ferðsluni í myrkri?

- ☐ Við at ganga har lyktarpelar eru, so mær nýtist einki at gera fyri at vera sjónlig/ur
- ☐ Við endurskini
- ☐ Við at vera í klæðum í bjørtum litum

**Spurningur 3:**

### Hvussu nógv minka endurskin um vandan fyri at verða árend/ur í ferðsluni?

- ☐ 45%
- ☐ 65%
- ☐ 85%

**Spurningur 4:**

### Hví eigur tú at brúka minst tvey endurskin – eitt hvørju megin?

- ☐ Eg má hava eitt eyka endurskin, um annað dettur av
- ☐ Eg má verða sædd/ur frá báðum síðum, tá ið eg fari tvørtur um ein veg
- ☐ Eg má hava tvey endurskin fyri at kunna læna onkrum eitt, um onkur hevur gloymt endurskin, og tað er vorðið myrkt

**Spurningur 5:**

### Hvar skal endurskinið helst verða fest?

- ☐ Endurskinið skal festast, so tað er í knæhædd, soleiðis at ljósið frá billyktunum rakar tað best
- ☐ Tað ger ikki mun, hvar endurskinið verður fest – tað er nóg gott at hava endurskin
- ☐ Best er, um endurskinið er seymað bakið á á jakkanum.

**Spurningur 6:**

### Hvussu virkar eitt endurskin?

- ☐ Tað lýsir alla tíðina
- ☐ Tað blinkar
- ☐ Tað kastar ljósið aftur, tá ið ljós skínur á tað

**Spurningur 7:**

### Endurskin verða gjørd av smáum...

- ☐ Mikroprismum
- ☐ Lampum
- ☐ Lummalyktum

**Spurningur 8:**

### Hvør er raskast at brúka endurskin?

- ☐ Børn
- ☐ Ung
- ☐ Vaksin